# Við íblástri úr Íslandi



**Ongantíð áður hava so nógvar ymiskar listagreinir verið umboðaðar á Várframsýningini hjá myndlistafólkunum. Framsýningin letur upp klokkan 17 í dag**

Randi Jacobsen

Hetta er 21. ferð, at Føroysk Myndlistafók hava Várframsýningina, sm bæði kann rúma vrk hjá limunum og verk uttaneftir.

Øll kunnu senda verk inn og royna at fáa tey við á framsýningina.

- Men limirnir eru ikki so óførir at senda inn, og tí er ofta neyðugt at biðja fólk sýna frram, sigur Ole Wich, nevndarlimur í Føroyskum Myndlistafólkum.

Tað var tó meira ella minni av tilvild, at seks íslendingar komu við á Várframsýningina, tí nevndarlimurin Unn Joensen kom at kenna teir og bað tey koma við.

14 føroyingar sendu verk inn, og verk hjá sjey teirra komu við. Hini vóru ikki vrakað, men teirra verk hóskaðu ikki til heildina, sigur Ole Wich.

Á framsýningini eru málningar, video-og ljóðlist, framførsla við verkum og annað.

Íslendingar arbeiða nógv við rúminum, at mála á staðnum.

- Tað er heilt vist, at føroysk listafólk hava nógv at læra av íslendingum, sigur Ole Wich.

Tey, sum sýna fram eru Anna Kathrina Højgaard, Eigil Lyngsø, Erla Haraldsdóttir / Craniv Boyd, Haraldur Jónsson, Hrafnkell Sigurðsson, Johan Martin Christiansen, Ludvík Breckmann, Marjun Jóanesardóttir, Martin Tórgarð, Pól Skarðenni, Sara Björnsdóttir og Þóroddur Bjarnason.

Framsýningin letur upp klokkan 17, og tað verður Carl Johan Jensen, sum tá sigur nøkur orð.

*Veist tú eina søgu, so SMS'a á 28 50 04*

*Eitt verk eitur "Spegil fyri fýra fólk", og verkið eigur Þóroddur Bjarnason*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vinnuhúsið fer at byggja

**Vinnuhúsið í Smærugøtu í Havn hóskar ikki til virksemið, og tí skal nýtt hús byggjast á Óðinshædd**

Randi Jacobsen

Vinnuhúsið er stórt, men tað varð upprunaliga bygt til sethús. Tað er tí ikki serliga væl egnað til virksemið í Vinnuhúsinum.

- Vit trívast væl í húsinum, og til dagligt ber til at arbeiða her, men húsið er óegnað, tá ið fleiri fundir eru, serliga samráðingarfundir, sigur Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum.

Húsið hevur tvey fundarrúm, og tað er í minna lagi. Serliga um ein fundur verður drúgvu, sleppa onnur ikki framat.

Haraftrat hoyrist alt ov væl millum rúmini.

- Vit tosaðu um at byggja um, men tað hevði kostað líka nógv sum at bygt nýtt, sigur Marita Rasmussen.

Vinnuhúsið hevur keypt grundstykki á Óðinshædd eystan fyri Effo, og farið er so smátt undir at fyrireika byggingina.

*Veist tú eina søgu, so SMS'a á 28 50 04*



*Vinnhúsið er ikki egnað sum Vinnuhús*